## DAGSINS MEINING

# Orð og gerningar

Fólkafloksmenn hava eftir øllum at døma ilt við at skilja, at gerningar mugu fylgja orðum, skulu hesir varðveita tað trúvirðið, teir nú einaferð máttu havt.

Fólkaflokkurin sigur, at um blokkurin ikki varð minkaður, so endaði hann í almennari nýtslu og avskeplaði búskapin. Argumentið hjá teimum kann fylgjast í ein vissan mun, men tá so hugt verður at avrikunum hjá hesari samgonguni, so er alt trúvirðið fokið. Hendan samgongan hevur forsømt grundleggjandi vælferðina og hevur økt umsitingina av hesari forsømdu vælferð. Tað er ikki so løgið, at Fólkafloksmenn eru illa við av gongdini, men sum ikki einaferð, so er bæði diagnosa og heilivágur skeivt hjá teimum.

Ongantíð áður er føroyska umsitingin vaksin so nógv sum undir leiðslu Fólkafloksins, samstundis, sum teir rópa upp um skattalætta her og avgjaldslækking der. Hetta hongur ikki saman! Okkum tørvar ikki eina stóra umsiting til at føra fólkaflokspolitikk og skuldarsanera rækjubátar.

Tað er lætt at fíggja eina stóra umsiting, tá man ger sum samgongan og fer niður til donsku stjórnina — óivað gjørdu teir tað við frælsi og sjálvbjargni í huga — og biður um ein prístalsreguleraðan blokk í trý ár.

Tað er eingin loyna, at ein flokkur sum Fólkaflokkurin priotierar øðrvísi, enn teir meira solidariskt sinnaðu flokkarnir.

Breckmannska pensiónsskipanin, ið samgongan ætlar at innføra er eitt greitt tekin um, at man ætlar so ikki at prioritera almennar vælferðarskipanir høgt. Tað er lag á manni, at innføra skattalættar og annað, um samfelagið verður bygt á mottoið “vertin á hvat annar fær, eg skal nøra sjálvum mær”.

Vónandi koma flokkar til eftir valið, ið styrkja hornasteinarnar undir vælferðini, nevniliga skúla, almanna og heilsuverk. Hesi øki, eiga at styrkjast, har tey eru nærmast borgarnum. Ábyrgd og umsiting má útdelegerast aftur til stovnarnar, og sentraliseringin, har aðalstýri seta seg á alla umsiting má steðgast. Borgarin fær einki burtur úr, at allar avgerðir mugu ta langu leið upp undir væðingina í umsitingini. Aðalstýri eiga at ráðgeva landstýrismonnum, og ikki umsita oljutangar í Vágum, privatisera kunningardiskar og avgera hvør skal skifta vindeygu á Landsjúkrahúsinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjálvstýrisflokkurin og Vága tunnilin

**Ása Olsen**



Kundi ikki annað enn fegnast, tá eg í degi og viku fríggjakvøldið tann 12. oktober hoyrdi, at orsaka av Vága tunnlinum, so eru fólk farin at byggja aftur í Vágum.

Tað kom eisini fram, at nú er meiri hugaligt at flyta aftur til oynna, sjálvt um ein starvast aðra staðni í landinum, tí at nú er tað bert ein spurningur um tíð til ein kann koyra um sundið.

Hvør minnist ikki tann 1. desember 1997, tá tíverandi landsstýrismaður í m. a. samferðslu málum Sámal Petur í Grund var koyrdur frá sum landsstýrismaður, orsaka av hesum málið.

Hví varð Sámal Petur í Grund koyrdur frá sum landsstýrismaður? Var tað tí at hann hevði gjørt nakað skeivt? Ella kanska tí at hann hevði verið óreiðiligur? Nei og aftur nei, hann varð koyrdur frá eina og aleina orsaka av sínum ótroyttiliga arbeiði fyri, at hesin undirsjóvar tunnil skuldi gerðast veruleiki.

Tað liggur tíverri til okkum menniskjur, at vit hava øgiliga lætt við at gloyma. Men eg rokni við, at tað mundu verða nógv sjálvstýrisfólk við mær, tá tey sóðu hesa sending fríggjakvøldið, mintist aftur á tann prís, ið Sámal Petur í Grund betaltið fyri hettar, ið var hansara hjarta mál.

Í einari tíð, har nógv verður tosað um bygdamenning, og um at styrkja útjaðarin, so er nettupp vágatunnilin eitt mál, ið ikki bert styrkir Vágoynna, men alt landið.

Tí kann eg sum sjálvstýrisfólk bert gleðast og fegnast yvir at síggja, at sjálvt um flókkurin/landsstýrismaðurin betalti ein stóran prís fyri hettar mál, og varð koyrdur frá orsaka av hesum, so hevur tað ikki verið til fánýtis.

# Nýggj svimjihøll í Tórshavn

**Heri Ziska**



Eg las eina áhugaverda grein hja Elin Lindenskov fyri nøkrum døgum síðan. Eg vil takka Elin fyri at tora at tosa um iløgur í ítróttar facilitetir. Hetta visur seg at verða eitt evni sum onkursvegna er blivið til ein spurning um ítrótt ella barna ansing, ítrótt ella skular osf. Hetta er sjálvandi ikki so. Eg vil loyva mær at koma við einum hugskotið til Elin og onnur at hugsa um.

Flestu føroyingar sum vóru við til oyggjaleikirnar høvdu á orið hvussu imponerandi ítróttar depilin á Isle of Man var. Har vóru facilitetir fyri allar ítróttargreinar á einum stad har tað fyri 16 árðum síðan einans var ein grasvøllur sum var nýttur sum rennibreyt á fyrstu oyggjaleikunum í 1985.

Kundu Føroyingar ikki gjørt okkurt tílikt? Hvat krevst fyri at tað kann lata seg gera? Hvørjir eru fyrimunirnir?

Fyri at byrja vid tí mest torførða. Hvat krevst? Tað sum krevst er ein góður vilji fra mynduleikunum og ítróttar greinunum í høvuðsstaðnum og sjálvandi ISF. Um Tórshavnar býráð og umboð fyri ítróttargreinarnar í høvuðsstaðnum eiga at stinga høvdini saman og finna útav hvat er dreymurin. Har kundi eg hugsa mær nakað sum umfatar bæði nýggja svimjihøll við 50 m hylið og vatnlandið sum Elin nevnur, ítróttarhøll, høll til fimleikara har amboðini kunna standa frammi árið runt, smærri hallar til t.d. judol, trampolin hoell og sjalvandi atletik facilitetir. Eisini vildi eg fyrisligið at har verða gjørd hølið har áhugaði kunna leiga seg inn til at hava ymisk sløg av venjing, t.d. Aerobics, spinning, styrkivenjing og sólir. Eisini skuldu verði høli sum ein kundi leiga út til ráðstevnur. Hesir facilitetir kunna hjálpa við til at gerða eitt slíkt centur sjálvberandi.

Fyrimunurin við einum slíkum centri er at tað óivað er nógvar ferðir bíligari at reka eitt centur enn 20 ymiskar hallar runt um í býðnum. Harafturat kemur eitt slíkt centur at hava so mikið av vitjan at tað kemur at loysa seg at hava onnur tilboð á staðnum (t.d. matstovu). Eisini kemur eitt slikt centur við tíðini at loysa flestu trupulleikar, sum so at siga allar ítróttargreinar í høvðstaðnum hava. Og,við tað at alt er við í uppruna planlegg-ingini, so vita tær ymiskur ítróttargreinarnar at har er eitt ljós við endan av tunellini. Hetta burdi merkt at tað verður minnið av ágangið á býraði um vantandi umstøður.

Fyri ítróttarfeløgini er tað stak týdningarmikið, at man kann seta seg niður og blíva einigur um eina raðfesting, sum øll kunna ganga við til. Um tað verður ov nógv klandur so er úslitið óiva at onki spyrst burturúr. Og fyri alt í verðini so má framgangsmátin verða, at man fyrst finnur útav hvat man vil, og so ferð í holt við arbeiði. Man sær í Gundadalið hvat hendir um man bert byrjar við at byggja og so hugsar seg um aftaná.

Eg havi sjálvur vant á einum slíkum centri síðani eg flutti til London at arbeiða í eitt ár. Tað er National Sports Centre í Crystal Palace. Har eru allir hasi facilitetir sum eg nevndi og so eisini innandura facilitetir til frælsan ítrótt, eyka kastibani, smáir kunstgrasvøllir til fótbólt (bæði innandura og uttandura), og ein bani til at koyra fjarðstyrdar bilar á. Harafturat er eisini barnaansing har børn verða passaði meðan foreldrini venja. Har er tað ein spurningur um tað ikki er ein møguleiki fyri at gerða okkurt tílikt meira permanent í Tórshavn soleiðis at har verður barnagarður í dagtímunum á staðnum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Sinnissjúkraálit undir landi



*Ein partur av psykiatrisku viðgerðini - sjúkrahúspsykiatriin - verður gjørd oman fyri vegin á Landssjúkrahúsinum*

**Arbeiðssbólkarnir, sum arbeiða við føroyskari psykriatriætlan í framtíðini, eru komnir undir land við arbeiðinum. Álit verða latin landsstýrismanninum um ársskiftið**

PSYKIATRI
*Edvard Joensen*

Tríggir arbeiðsbólkar arbeiða við ætlan um føroyska psykiatriviðgerð í framtíðini. Arbeiðið er komið so mikið væl áleiðis, at nú verða álit skrivað í næstum, og verða tey helst latin landstýrismanninum um ársskiftið.

Lóggávan, sum galdandi er á psykiatriska økinum í Føroyum, er rættiliga gomul. Talan er um danska lóg um psykiatri frá einaferð í tríatiárunum í seinastu øld.

Ásannað er, at lóggildingin í Føroyum eigur at verða broytt, men enn er tað ikki gjørt, hóast tann danska lógin er broytt. Men nýggja, danska lógin er ikki sett í gildi í Føroyum.

## Fleiri bólkar

Tríggir ymiskir arbeiðsbólkar arbeiða í løtuni við at dagføra lógarverkið á økinum. Men ikki er endalig støða tikin til, um vit skulu hava donsku lógina í broyttum líki, tillagaða føroyskum viðurskiftum. Um vit skulu hava eina nýggja, føryska lóg, ella halda fram við teirri gomlu, donsku lógini.

Arbeiðsbólkarnir, sum sita, arbeiða við teimum trimum økjunum: Økispsykiatri, sjúkrahúspsykiatri og sosialpsykiatri.

Í økispsykiatriini verður miðað í móti at koma út til sjúklingin í hansara dagliga umhvørvi og viðgera hann har.

Sjúkrahúspsykiatriin gongur út upp á at fáa sjúklingin innlagdan og viðgjørdan á sjúkrahúsinum, meðan sosialpsykiatriin miðar í móti at fáa sjúklingin út aftur í sosiala umhvørvið, har hann hoyrir heima.

## Undir landi

Endaliga úrslitið av arbeiðinum hjá teimum trimum bólkunum, sum hava arbeitt við málinum, er komið so mikið væl áleiðis, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, at nú er mestsum bara eftir at skriva álit, sum skulu latast landsstýrismanninum.

Trý álit verða skrivað, sigur hann. Eitt fyri hvønn bólkin. Og hann væntar, at tað fyrsta verður liðugt um ein mánað ella so, meðan hini bæði fara at verða klár um ársskiftið.

Hvørji tilmælini, bólkarnir fara at koma við, verða, sigur hann seg einki vita um enn.

Sámal Petur í Grund sigur, at vit gjørdu av ikki at taka við nýggju, donsku lógini, soleiðis sum hon er, tí vit ikki hava orku til at umsita hana, men royna at finna okkara egnu, sum best hóskar til okkara viðurskifti.

Men tað er ikki sagt, at álitini, sum nú fara at koma, verða tey, sum fara at mynda eina komandi lóg. Tá tey fyriliggja, skulu tey til politiska viðgerð, og har kunnu ymsar broytingar koma uppí.

Annars eru fleiri møguleikar, sigur landsstýrismaðurin. Donsk lóggáva er á økinum, og skulu vit gera okkara egnu lóg um psykiatri, skulu vit hava loyvi til tess frá dønum. Men tað hevur gingið heldur striltið við tí á øðrum økjum seinnu tíðina, vísir Sámal Petur í Grund á. Helst eru tað teir politisku spenningarnir, sum eru milum danir og føroyingar í løtuni, sum gera tað, metir hann.

Men møguleikarnir eru so við donskum loyvi at gera føroyska lóggávu. Taka nýggju donsku lógina og tillaga hana føroyskum viðurskiftum ella bara at halda fram undir gomlu, donsku lógini.

– Vit vita einki vist enn, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum.

Hann ásannar, at tað er komið alt ov stutt á økinum, og tað verri enn so gongur, sum ætlað og ynskiligt kundi verið. Tað eru altíð tey veikastu, sum standa eftir. Og ásannað verður eisini, at sera lítið hevur verið at hoyrt til málið, nú fíggjarlógin hevur verið til fyrstu viðgerð í tinginum.


# Venjingartíðir
## í Badmintonhøllini 2001-2002

**Fríggjadag**

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00-15.45 | Smápiltar (93) |
| Kl. 15.45-16.30 | Smápiltar (92) |
| Kl. 16.30-18.00 | Piltar |
| Kl. 18.00-18.45 | G.10-12 |
| Kl. 18.45-19.30 | G. 12-14 |
| Kl. 19.30-20.30 | Smádreingir |
| Kl. 20.30-21.30 | Dreingir |
| Kl. 21.30-22.30 | G.14/17 Kv. |

Byrjað verður fríggjad. 19. okt.

**Hósdag**

Kl. 18.00-19.00 G. 8-10 Høllini í HB-húsinum



Byrjað verður hósd. 29. nov.

Venjingartíðirnar eru eisini at finna á HB-heimasíðuni www.hb.fo undir felagið/venjing

**Havnar Bóltfelag**
Tlf. 25 34 97

Sosialurin - 311820

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

**Til útisetar í Danmark**
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**

**Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið**

**Skjót levering**

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
www.danstein.fo Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

Sosialurin Sosialurin

Høvuðsreingerð
Frá A til Z til
Fyritøkur, Stovnar, Skúlar, Privat, Skip
Teppireins, Bona G lv,
Fastar avtalur til vinnulívið
Vaskarí & Reingering
Kvalitets reinger s ani 198
Tel • 21 13 12 • 31 63 00

# Vørugoymsla og handilsinnbúgv til sølu

Vegna Sp/f 01.07.98 (Feðgar), 620 Runavík í konkurs verður vørugoymsla og innbúgv lýst til sølu.

Vørugoymslan er Lewis buksur og onnur mannfólkaklæði.

Innbúgvið er handilsinnbúgv, diskar, hillar, kassaapparat o.a.

Áhugað kunnu venda sær til Advokatfelagið við Strond 4 at fáa nærri upplýsingar, og avtala kann gerast um at síggja lutirnar.

Búgvið tilskilar sær rætt til at velja millum innkomin boð, herundir til ikki at góðtaka nakað boð.

**Advokatfelagið við Strond 4**
**Yviri við Strond 4**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 31 12 60 · Fax 31 12 61**
**e-mail: advfelag@post.olivant.fo**

**Tormóður Djurhuus, Dánjal Magnussen, adv.**
**Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv.**
**Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv.**
**Ingi Højgaard**

# Bilar til sølu

**Ford Mondeo** stationvognur, turbo diesel
**Scania 142**

**Tlf. 213220**

www.sosialurin.fo